# Kommunuvalið 2004 - viðmerkingar

**Frits Johannesen**



Tað rýkur um hamrar og gjáir, og hann tekur leyst á firðum og vágum. Kommunuvalevnini standa á ytstu upsum í hesum guvuroki og bjóða seg fram at verja demokratiið á einum sjálvtøkuborði, har verðarnir eru nógvir og litríkir.

Summi gera borgaralista, onnur finnast saman í politiskum átrúnaði og kvinnurnar standa á egnum ódnum og ætla at reka í sínum lag. Kommunala valfjallskipanin er nú sett, og nú er bert eftir at reka.

Sigast kann, at orðingarnar eru ymsar og fjøltáttaðar. Til dømis lovprísar Sigurð Simonsen borgarstjóri í Fuglafirðir hesa søguligu uppstilling, sum nú er farin fram í bygd okkara, sum hann kallar fyri ein borgaralista. Valevnini á hesum lista eru verkamannaleiðarar og vanlig fólk. Sigurð er fólkafloksmaður og hini velja t. d. javnaðin, tjóðveldið og sambandið, tá ið um løgtingsvalið ræður. Einki ilt um tað. Møguliga verður gongdin tann, at tað ikki verður stillað upp politiskt í komandi tíðum, men at fólk finna saman og vilja bygdasamfeløgunum tað besta uttan partapolitiska gongd. Um tað er betri, lati eg liggja.

Nú fara so fakfelagsbossarnir á staðnum í song við einum borgarligum veingi og øðrum. Um tey skulu brúka fyribyrgjandi ella lata standa til, veit eg ikki, men okkurt kundi komið burturúr.Kanska fara tey bert at lyggja undir dýnuni og lúra við eini lummalykt og lýsa hvørt upp á annað. Tað er so stuttligt.

Palles Athene var dóttir Zeus. Hon kom ein dag brestandi úr pannuni á Zeus væl brynjað — hon var til dystin fús. Perseus fór til heimsins enda og høgdi høvdið av Medusa. Hetta varð sett í barmin á Palles Athene og Guð náði tann, ið hugdi upp í andlitið á Medusa, hann bleiv til stein- steinrunnin

Nú fáa vit at síggja, hvat spyrt burturúr — um hetta verður ein turgeld seingjarlega, ella tað fer at bresta fyri nev á pannunum hjá hesum fólkum, og ein nýggj politisk guðinna fer at spjálka sær í okkara lítla samfelag í hesi øld. Eg gevi Sigurði rætt, at hetta er ein søgulig hending. Úrslitið kann blíva tað, at tann nýggja politiska guðinnan fer at hava eitt borgarligt medusahøvd í barmi sínum, ella ein hermafroditt ( tvíkynjing), ein bronding, ella bara eitt reindyrkað verkamannamedusuhøvd í bringuni. Her skal ikki takast dagar ímillum, hvat er best, tað kunnu fólk meta um sjálvi.

Tað er á øðrum sinni, at ein kvinnulisti er til valið í Fuglafirði. Hetta haldi eg vera framúr gott. Kvinnan hevur størri intuitiva hugsan enn maðurin. T. d. í okkara lítla samfelag sita kvinnurnar og fáa frítiárfeløgini at standa á lunni. Hetta er teimum til mikla tign og øllum øðrum at gagni. Tær hava bert og bert tað fyri eygað, at eitt gott úrslit skal koma burtur úr feløgunum. Ikki tráa tær við mekt og mæti at lunnbótin skal verða teimum eitt medusahøvd, sum øll skulu drýpa høvur fyri. Nei, æran er fagrasta træ í skógini, og ærukær er kvinnan, tí ger hon hetta at lata av høvdinum, so tað gagnast øllum. Tað hevði ikki verið sum verst, um tvær, tríggjar kvinnur komu í tað kommunala nestið og bóru sína hugsan fram. Tá ið báturin varð drigin av lunni og farið varð út í fjørðin, vóru kvinnurnar við og fingu sín part. Tær høvdu eisini givið ráðnum fjøltáttaðan intutivan ræktsur, so vit fingu eina øðrvísi gongd á tí politisku rákaleiðini. Hetta er eitt evni, sum kundi verið vert at nomið við undir øðrum rensli. Lat hetta liggja.

Haldi at okkara lítla samfelga er eitt livandi samfelag. Tað sæst, hvussu væl fólk duga at føra seg fram í orð og tal og skrift, nú kommunala valið stendur fyri durum. Litrík eru upprópini, ið detta inn um gáttina, greið og myndirnar av persónunum, bera ikki brá av medusafjesum, men heldur av einglaandlitsbrøgdum, sum boða frá trúvirði, opinleika og gjøgnumskygni. Her eru umleið fimmti andlit at velja ímillum. Millum valevnini eru t. d. í tveimum førum feðgar á hvør sínum lista. Hvussu valt verður í hesum heimum, er ilt at siga. Kanska býta tey javnt á stokkinum, og hvør fær sína atkvøðu tillutaða kristiliga. Hugsi ikki at ósemja stends av hesi orrustu. Bretar plaga at siga: Charity begins at home ... og her eigur demokratiið eisini fáa sínar skølingar upp á beinini.

Gott val!

# Røktarheim ! Miðnámsskúli !

**Jeanna í Lágabø & Sirið Stenberg**
*Vágur*

Í kjalarvørrinum av tí, ið er frammi í fjølmiðlunum, og millum manna um avgerðina, sum Føroya Landstýrið hevur tikið at byggja røktarheim í Vági stinga nógvir spurningar seg upp, sum vit ikki meta eru nóg væl lystir.

Vit sóknast eftir um Føroya Landstýrið hevur nakran skipaðan eldrapolitikk og hvørjar raðfestingar eru gjørdar á hesum øki?

Er tað ætlanin hjá Landsstýrinum at menningin á eldraøkinum, skal liggja í bara at byggja stovnar, ella hevur landsstýrið nakra ætlan um at víðka um tænasturnar til fólk ið búgva heima?

Í Eldraálitinum kemur klárt fram, at fólk ynskja at vera longst møguligt í egnum heimið, hetta kemur eisini fram, tá ið ein tosar við fólk um hvussu tey ynskja teirra ellisár skullu vera.

Á øðrum økjum innan heilsuøkið verður arbeitt meira og meira við at integrera fólk í samfelagið, ella sagt ørðvísi, við at fáa fólk at flyta út av stovnum, at betra stuðulsskipanir, arbeiðspláss dagtilboð o.s.fr.. Arbeitt verður framímóti smærri eindum tillagar tí einstaka. At byggja eitt stórt røktarheim er heilt í ansøgn við henda hugsunarhátt.

Og hvussu við tørvinum á einum røktarheiminum, er nøkur nágreinilig kanning gjørd av bráfeingis tørvinum av røktarheimsplássum í Suðuroynni? Nógv arbeiðspláss kunnu setast í verk, uttan at byggja stórar stovnar, bert viljin er til tess. Tað vit sóknast eftir er einum manglandi orðaskifti um hvat ætlanin er á eldraøkinum í Suðuroynni?

Fyri einum árið síðani var staðfest, at hjálpin til tey heimabúgvandi eldru/ tey hjálpartreingjandi bert kann játtast um fíggjarligu karmarnir eru tilstaðar, og ikki einans útfrá eini fakligari tørvsmetan hjá tí einstaka sum hevur hjálpina fyri neyðini.

Vit meta ikki at tað er samsvar ímillum hetta, og so at byggja eitt røktarheim í Vági fyri 35 milliónir.

Landsbúskaparliga er tað nógv dýrari at byggja og reka røktarheim, í mun til at hjálpa fólkið í egnum heimi, vardari íbúð ella á sambýli.

Um Landsstýrið veruliga vil hava fleiri almenn arbeiðspláss í Suðuroynni, hevði eitt uppskot verið at fingið ætlaðu døgnrøktarskipanina at virka, at útbygt økispsykiatriina so at hon fer at virka sbr. álit um økispsykiatri. Ætlaða økisterapiin er sum kunnugt heldur ikki sett í verk í Suðuroynni.

Hetta eru alt arbeiðspláss, sum í flestu førum kunnu verða røkt av fólkið við viðkomandi røktarfakligum førleika.

Ein spurningur er eisini sum onganstaðni er svaraður, hava allar arbeiðsleysar kvinnur/menn í Suðuroyar sunnaru helvt hug, hegni og útbúgving til at starvast innan røktarøkið.

Okkum vitandi er arbeiðsloysið í økinum ikki størst ímillum starvsfólk innan heilsuøki, men serliga hjá teimum sum starvaðust innan fiskivinnuíðnaðin á landi.

Vit meta at tað er ein óvirðuligur framferðarháttur, sum verður brúktur, hetta at bert um vit fáa eitt røktarheim í Vági, so eru allir spurningar viðvíkjandi arbeiðsloysinum loystir. Tey eldru eiga at fáa tað hjálp, ið tey ynskja og tørva, og ikki at verða brúkt á henda hátt.

Hetta skal ikki skiljast so, at vit ikki meta at tað er tørvur á nøkrum røktarheimsplássum afturat í Suðuroynni, og sjálvandi skulu tey ið hava tørv á hesum fáa tað.

Tað vilja altíð verða umstøður, sum gera at eitt røktarheimspláss er einasta loysn.

Í Dimmalætting og í Úf 6/11 var frammi um verkætlanina "Lív okkara sum eldri". Her kemur týðuliga fram, at ikki bert hjá okkum, men eisini í norðanlondum ynskja fólk at vera longst møguligt í egnum heimi. Heimsheilsustovnurin WHO leggur eisini upp til hetta.

Somuleiðis stendur at lesa í Eldreálitinum frá 2002 at " tænastuveitingin av eldrarøkt eigur at byggja á ynski hjá eldri fólkið, at megna ein sjálvstøðuga tilveru, so leingi tað er gjørligt, fyrst í sínum egna heimið, ella í einum egnaðum heimið, og um neyðugt í egnaðum røktarbústaðið. Bert á tann hátt kunnu vit virka fyri heilsu og trivnaði hjá eldra ættarliðnum"

Og hvussu við Sambýlunum sum kommunurnar kring landið hava bygt, og framvegis arbeiða við?

Og hvør ber kostnaðin av einum røktarheimið í Vági, hetta er kanska ein tann størsti ósvaraði spurningurin í øllum málinum ?

Hvussu verður um eldraøkið verður lagt út á kommunurnar, fer Vágs Kommuna at klára at reka bæði røkt til heimabúgvandi, sambýlisbúfólk og røktarheim?

Ella verður hetta ein felags uppgáva fyri alla Suðuroynna?

Røktarheim og miðnámsskúli kunnu ikki setast upp ímóti hvørjum øðrum.

Landsbúðskaparliga er tað ókiljandi í hesum krepputíðum at Landsstýrið ætlar at blaka millióna-upphæddir burtur sum eru goldnar bæði í lands og kommunuskatti við tí arbeiði ið longu er gjørt, og sum nú møguliga fer fyri skeytið um miðnámsskúlin verður fluttur.

Tað hevur eisini verið frammi at ein miðnámsskúli skapar ongi arbeiðspláss, hetta eru vit slett ikki samdar í. Skúlin er fyrst og fremst arbeiðsplássið hjá næmingunum í trý ár, harafturat eitt fast arbeiðspláss hjá lærarum, vaskifólkið og øðrum. Eisini skapar sjálv byggingin av skúlanum líka nógv arbeiðspláss sum byggingin av einum røktarheimið.

Tað er onki, sum forðar fyri, at skúlin verður víðkaður til eisini at fevna um aðrar útbúgvingar, bæði nú og seinni.

Eitthvørt framkomið samfelag eigur at raðfesta útbúgving sera høgt. Um vit kunnu skapa møguleikar fyri okkara ungu, at vera her ungdómsárini, er møguleikin eisini størri fyri, at tey koma aftur her at búgva.

Miðnámsskúlin kastar nógv av sær til Vágs Kommunu, bæði trivnaðarliga, fíggjarliga, og socialt.

Í øðrum londum har arbeitt hevur verið miðvíst við at fáa skúlar og útbúgvingarstovnar til, hevur hetta víst seg at hava ómetaligan týdning. Dømi um hetta eru Akureyri í Íslandi og Tromsø í Noregi, har útbúgvingarstovnar hava so at siga drigið aðrar stovnar til sín, hava økt um tilflyting og menningina í hesum økjum. Skullu vit hugsa um økismennig, er hetta ein góður møguleiki hjá Landsstýrinum at vísa í verkið, at teir ynskja at arbeiða við hesum.

Vónandi kunnu hesi orð seta nakrar hugsanir í gongd, og skapa karmar fyri einum kjaki og einari virðuligari støðutakan enn tað, sum vit uppliva fer fram í løtuni.





# Viðmerking til Sjónvarp Føroya

**Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, Føroya Væl,**
*Bjarki Mohr, form*

**Valfelag Sambandsfloksins í Suðursteymoy,**
*Annfinn Brekkstein, form.*





Eftir at hava sæð tíðindasendingina, Dag og Viku, hjá Sjónvarp Føroya, fríggjadagin 5. november 2004, er tað ikki sørt, at fleiri okkara - við áhuga fyri politikki - sita eftir við einari løgnari kenslu.

Í sendingini er eitt kjak millum nú - og fyrrverandi býráðsformennirnar fyri Tórshavnar kommunu, har orðaskifti legði upp til hvør teirra skuldi taka við sum býráðsformaður eftir kommunuvalið týsdagin 9. november 2004. Annar hevur stilla upp aftur fyri Fólkaflokkin og hin fyri Tjóveldisflokkin.

Tað er undrunarvert, at tveir frammanundan royndir politikkarir, sleppa framat eini almennari tíðindasending, beint fyri valinum, havandi í huga, at øll onnur ið á einhvønn hátt hava tilknýti til almenna tíðindaflutningin verða sett í karantenu, tá tey hava fráboða at tey stilla upp.

Tað gerst tí nærliggjandi at spyrja, hví ein partaleysur tíðindaberði sum Sjónvarp Føroya, velur at hava samrøðu við nú- og fyrrverandi býráðsformennirnar í Tórshavn, tá umboð fyri hinar flokkarnar til kommunuvalið ikki koma framat?

Um Sjónvarp Føroya ynskir at lýsa hesa síðuna av samfelagskjakinum, hevði tað so ikki verið hóskandi - meira dámligt og rættvíst - at Sjónvarp Føroya fyriskipaði eina valsending, har umboð fyri allar politisku flokkarnar sluppu framat við sínari áskoðan á júst hesi viðurskifti, heldur enn at geva tveimum flokkum ein eyðsýndan fyrimun.

# Í hjørtum okra býr vónin um støðugt arbeiði og framburð fyri Vág og Suðuroynna

**Jens Sivar Djurhuus**
*Valevni hjá Sambandsflokkinum*

Tað hevur nógv verið tosað um støðuna í Vági og Suðuroynni sum heild.

- Um støðugt vaksandi arbeiðsloysi
- Um kreppuna sum okur ongantíð veruliga komu burturúr
- Um fleiri almenn arbeiðspláss til Suðuroynna, sum skulu skapa javnvág
- Um ein suðuroyargrunn, sum kundi verið við til at menna økið aftur vinnuliga
- Um at nú skuldi Fiskavirking lata gamla Polarfrost uppaftur

Og soleiðis kunnu okur halda fram at grenja um okra trupulleikar og framhaldandi vóna at hini skulu loysa teir.

Tað at onnur skulu loysa okra trupulleikar og skapa okum arbeiðspláss er alt fínt, men tað mettar ongan munn og skapar ongi støðug arbeiðspláss.

Higartil hevur tað einans verið ein stór luftkastella, ein politisk sápubløðra.

Tað, sum skal til er, at okur sjálv smoyggja upp um ermar og veruliga seta okum sum mál, at nú skal vend koma í – nú seta okur sjálv dagsordanin og fara til verka.

Fyrsta málið hjá nýggju býráðssamgonguni má tí vera at gera eina miðvísa vakstrar- og uppbyggingarætlan fyri økið, og tað er neyðugt at allar góðar kreftir í vinnuni, saman við politiska myndugleikanum, eru við at skapa hesa ætlan og síðan fara í holt við at fáa verkætlanina førda út í lívið.

**Sambandsflokkurin** hevur altíð verið við til at skapa karmar, tað hava okur sæð í landspolitikkinum ferð eftir ferð og okur vilja eisini við leiðsluni í eini nýggjari býráðssamgongu her í Vági verða við til at menna økið og fáa tað upp aftur á tað støði, sum neyðugt er fyri at hava eitt gott lívsgrundarlag og trivnað bæði fyri ung og gomul.

Set tí krossin við Sambandsflokkin – flokkur fyri teg.

# Tvøroyri og trivnaður

**Poul Olsen**



VAL04

Fíggarliga støðan hjá Tvøroyrar kommununi er soleiðis hátta, at ein stórur partur av inntøkunum fer til at gjalda skuld við, og soleiðis má tað vera eina tíð framyvir. Fara mettu inntøkurnar at halda, so kann kommuna verða skuldarfrí um ikki so nógv ár, um hildið verður fast við verandi gjaldshátti. Kommunan kann sostatt síggja fram til at fáa eitt nógv størri fíggjarligt frælsi

Tá ið fíggarligu karmarnir eina ferð loyva tí, hevði tað ikki vera av vegnum at fingið eina nýggja svimjihøll bygda onkrastaðni í býnum. Hetta er nakað, ið kann verða øllum borgarum at gagni, ungum sum eldri. Eftir mínum tykki skulu borgarnir hava eina gularót, og eisini fyri at lokka fólk at flyta til kommuna.

Eitt av valevnunum til býráðsvalið í Tórshavn skrivar, at nú er vorðið so trongligt í svimjuhøllini har, at tey standa sum sild í tunnu. Tað verður valla trupulleikin hjá okkum, men skulu vit gera nakað við trivnaðin, og tað eg áður havi nevnt, so eiga vit at fremja slíka ætlan í verki.

Verkætlanir og smærri arbeiði, sum hava stóran týdning fyri núverandi og framtíðar borgarar eru í gongd. Hesar útbyggingar mugu halda fram og gerast lidnar eftir tíðarætlanini. Ein tíðarætlan er gjørd fyri, at hon skal haldast! Hettar hevur alstóran týdning fyri, at kommunan kann fara undir aðrar verkætlanir, sum t.d. at gera økir byggibúgvin, útbyggja havnalagið og bátahyl til stuttleikabátar burturav.

Vit hava brúk fyri nýhugsan á fleiri økjum, ikki minst á tí vinnuligi.

Nú tað liggur í luftini at leggja málsøki út til kommunurnar at umsita, so er tað av stórum týdningi, at vit hava eina sterka kommunala eind. Tað vil siga, at vit mugu leggja kommunurnar í Suðuroynni saman.

Farið á val og veljið lista C!

Gott val.

# Kommunan fyri allar borgararnar

**Jói Winther**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar býráð*



VAL04

*Skapa álit millum býráð og borgara*
*Systkinaavsláttur fyri børn í ansing*
*Eldrarøktin skal betrast*
*Betri ungdóms- og familjupolitikur*
*Betri umstøður til tey, ið bera brek*
*Lestrarbústaðir skulu gerast*
*Gera vegin oman á Studentaskúlan*
*Tónleikaframleiðsla skal hjálpast*
*Hjálpa til at seta arbeiðsskapandi tiltøk í verk*
*Endurnýtslan skal mennast*
*Skapa góðar karmar fyri eitt sunt vinnulív*
*Útróðrarbátarnir fáa nøktandi sømdir*
*Føra ein ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk*

Hesum málum vil eg virka fyri at røkka – uttan tín stuðul kann eg einki.

Við vón um tína atkvøðu

# Fleiri tilboð til ung sum tilkomin

**Dánjal Petur Hansen**



VAL04

Runavíkar kommuna hevur verið alt og lítið aktiv til tess at fleiri tilboð til ung og tilkomin er vorðin til veruleika. Talan hevur tvørturímóti í alt ov stóran mun verið um afturhald.

Ein av høvuðsfyritreytunum fyri góðum trivnaði í býnum, er at tað pláss fyri okkum øllum, og har vit øll føla okkum væl. At tað er rúm fyri einum ríkum og fjølbroyttum ítróttar- og mentunarlívi er avgerandi fyri trivnaðin.

Styrkin hjá Runavíkar kommunu hevur verið tað fyritakssemi fólkið her hevur víst.

Dynamikkur og fjølbroytni gevur býnum lív, og skulu vit sum kommuna stuðla teimum, sum ikki eru bangin fyri at taka tøk, og broyta burturúr nýggjum.

Ein sterk kommuna er ein kommuna fyri øll, og eigur hetta at verða ein sjálvsagdur málsetningur fyri framtíðina

Framtíðin kemur ikki at sær sjálvum.

Vit mugu vilja framtíðina og velja framtíðina.